# Tvørkynd

- ein vegleiðing til heim, skúla og onnur -

# Innihald

Fororð .......... 2
Orð og hugtøk .......... 3
Kynssamleiki .......... 4
Familjan alneyðugur stuðul .......... 5
Skúlaviðurkenning avgerandi .......... 7
Kunningartilfar .......... 11

# Fororð

Sum áhugabólkur fyri foreldur og avvarðandi hava vit øll staðið í støðuni við ongari og sera lítlari kunning og vitan bæði hjá okkum sjálvum, myndugleikum og í nærumhvørvinum. Tískil tók bólkurin stig til at gera ein kunnandi faldara, sum í fyrsta umfari vendir sær til foreldur og skúla. Í øðrum umfari er hetta eisini ein breið almenn kunning, ið vit meta betrar forstáilsið fyri hesum sera lítla og ofta marginaliseraða bólki.

Vón okkara er, at tikið verður væl ímóti hesum faldara, og at foreldrabólkurin við hesum kann bøta um kunnleikan um tvørkynd og bøta um teirra møguleika fyri betri inklusión og trivnað í føroyska samfelagnum.

Foreldrabólkurin hevur við íblástri frá líknandi felagsskapum í Danmark og Íslandi gjørt faldaran. Á heimasíðu okkara foreldurattvorkyndum.fo eru tilvísingar til hetta kunningartilfar og annað upplýsandi tilfar frá myndugleikum og áhugafelagsskapum.

Faldarin er í trimum pørtum. Fyrst eru nakrar allýsingar av hugtøkum og ein almenn lýsing av hugtakinum í tvørkyndum høpi. Síðani er ein partur, ið serliga er ætlaður familjum, og síðst ein partur ætlaður skúlum. Báðir partarnir eru tó eisini kunning til ein og hvønn, sum vil kunna seg um evnið

*Foreldur og avvarðandi at tvørkyndum*

# Orð og hugtøk

## Kyn

Vit eru øll fødd inn í ein heim, har okkara kyn hevur stóran týdning fyri tær væntanir og teir møguleikar, ið vit fara at møta í lívinum. Kynið er við til at mynda okkum og heimin rundan um okkum, og tað er við til at seta karmarnar fyri okkara lívi og sambandi við onnur.

## Føðikyn

Føðikyn verður staðfest, tá ið vit verða fødd. Tað merkir, at ein persónur er løgfrøðiliga viðurkendur sum antin genta ella drongur og fær tilskilað p-tal, sum verður nýtt í sambandi við t.d. almennar skipanir. Hjá teimum allarflestu er føðikynið í samsvari við kynssamleikan.

## Tvørkynd og kyn

Hjá tvørkyndum er ósamsvar millum kynssamleika og føðikyn. Ein tvørkynd genta/kvinna er fødd við kallkynskroppi, men kennir og sær seg sum gentu/kvinnu, og ein tvørkyndur drongur/maður er føddur við kvennkynskroppi, men kennir og sær seg sum drong/mann. Hetta merkir, at tvørkynd ikki kenna seg aftur í tí kroppinum, tey eru fødd í.



# Kynssamleiki

At vera tvørkynd/ur er einki nýtt. Seinastu árini er opinleikin vaksin, og harvið eisini uppmerksemið um tvørkynd og ynski, avbjóðingar og tørv teirra.

## Nær veit mann, at mann er tvørkynd/ur?

Tað er sera ymiskt, nær mann veit, at mann er tvørkynd/ur. Summi foreldur kunnu tíðliga í lívinum hjá barninum leggja til merkis, at barn teirra er tvørkynt. Hjá øðrum hendir tað ikki fyrr enn seinni, t.d. tá ið barnið fer í ungdómsárini ella er blivið vaksið. Tað er sera torført og persónsbundið, nær tvørkynd viðurkenna sín kynssamleika fyri sær sjálvum og øðrum.

## Umskifti hjá tvørkyndum

Tað er ymiskt, hvussu vit vísa okkara kynssamleika. Fyri tvørkynd kann hetta hava við sær skifti til nýggja útsjónd, nýtt navn ella nýggjar sosialar samanhangir. Tað hevur týdning, at tvørkynd fáa møguleika at fara ígjøgnum hesa tilgongd og vísa sín samleika fyri umheiminum í egnari ferð. Foreldur og avvarðandi eiga altíð at tryggja, at børn og ung kenna seg trygg við at vísa sín kynssamleika á tann hátt, ið tey sjálv vilja.

## Tá mann kemur fram sum tvørkynd/ur

Summi tvørkynd kunnu tíðliga siga foreldrum sínum ella øðrum nærumhvørvinum frá sínum kynsliga samleika. Onnur siga frá hesum seinni í tannáringaárunum ella sum vaksin.

Tað kunnu vera ymiskar umstøður, sum hava ávirkan á, nær mann kennir seg til reiðar ella noydd at koma út sum tvørkynd. Summi hava tørv á at savna dirvi at koma fram við sínum kynssamleika orsakað av ótta fyri útihýsing og happing. Onnur hava kanska brúk fyri at síggja ella møta øðrum tvørkyndum, so tey kunnu seta orð á upplivingina av at vera eitt annað kyn. Tvørkynd ung kunnu uppliva kynsbúningina og kropsbroytingarnar sum óynsktar og hava tørv á serkønari hjálp at takkla trupla umskiftið.

## Tá ið útsjónd og nøvn broytast

Hugtakið sosialt umskifti lýsir broytingina, sum hendir, tá ið ung broyta útsjónd við klæðum og hársniði. Harumframt verða navn og fornavnanýtsla broytt (hann/hon), so útsjónd og navn samsvara við innara samleikan.

Tvørkynd, sum broyta klædnastíl og hársnið, navn og nýtslu av fornøvnum, soleiðis at tað samsvarar við teirra kynssamleika, uppliva nøgdsemi og gleði við at kunna vera, gera og bera seg fram, so sum tey veruliga vilja. Foreldur og avvarðandi stuðla best trivnaðinum við at viðurkenna og virða hesi ynski.

*Tað er heilt natúrligt at siga rætta fornavnið og bert vísa til mítt barn sum tað kynið, sum mítt barn er. Vit gjørdu avtalu beinanvegin um, at um tú av tilvild segði okkurt skeivt, so var tað ok, um tú skundaði tær at rætta tað beint aftaná.*
— Eitt foreldur

*Tað var ein frígerandi og staðfestandi uppliving loksins at verða sæddur sum tað kynið, eg eri. Smálutir sum at verða kallaður "hann" av einum fremmandum, keypa mannfólkaklæðir, vera í slipsi og klippa hárið stutt, fingu meg at kenna meg meira sum meg sjálvan. Smátt um smátt byrjaði alt at kennast meira og meira rætt. Eg gekk á Pride og hitti onnur ung tvørkynd fólk gjøgnum felgsskapir sum LGBT+ og kendi meg minni einsamallan.*
— Ein ungur



# Familjan alneyðugur stuðul

Fyri tvørkynd er umráðandi at kenna seg skilt, fevnd og góðtikin av sínum nærmastu. Tá ið tvørkynd hava eitt trygt og stuðlandi netverk rundan um seg, trívast tey á jøvnum føti við onnur.

Vantandi stuðul og viðurkenning í familjuni kann hinvegin hava negativa ávirkan á sálarligu heilsuna og økja um vandan fyri angist, tunglyndi og sjálvskaða.

Foreldur og avvarðandi ynskja børnunum tað besta. Tey kunnu tó stúra fyri broytingunum og avleiðingunum, sum fylgja við at liva í samsvari við sín kynssamleika.

## Felagsskapur og rúmd

Tað er umráðandi fyri øll at hava vinir, sum lurta og skilja tey. Tvørkynd hava sjálvandi júst sama tørv á at finna sítt stað í felagsskapum. Eitt stað, har tey kunnu vera tað, sum tey eru.

## Tær truplu kenslurnar

Tað er vanligt at kenna ørkymlan, óvissu, ótta og sorg, tá ið ein í familjuni vísir seg at vera tvørkynd/ur.

> *Vit bæði vóru rakt av stórari sorg. Harafturat kom ringa samvitskan um, at vit ikki høvdu skilt okkara barn og tí høvdu útsett tað so leingi. Samstundis stúrdu vit fyri, um vit kundu halda barninum føstum í eini støðu. Alt, sum vit hildu okkum vita um kyn og samleika, vísti seg at vera ein sera einføld mynd av veruleikanum. Vit stóðu líkasum á berum.*
>
> — Eitt foreldur



Foreldur og avvarðandi kunnu onkuntíð hava trupult at fylgja við tørvinum hjá tí unga. Tvørkynd hava ofta umhugsað støðuna langt áðrenn, tey velja at siga tað við familjuna. Spurningar og stúranir hjá foreldrum og avvarðandi kunnu fatast negativt og særandi, og tað kann kennast sum ein byrða, um tvørkynd ferð eftir ferð skal greiða frá støðu sínari.

Tí kann tað onkuntíð vera til gagns hjá foreldrum og avvarðandi at leita sær vitan aðrastaðni og tosa við onnur um sínar spurningar og stúranir.

> *Eitt tað besta hevur verið at havt eitt netverk at hittast við. Nú vart tú knappliga ikki longur so einsamøll við tí. Tað er umráðandi, at tey, sum eru nýggj í tí, vita, at tey hava eitt stað at fara.*
>
> — Eitt foreldur

## Ein góður stuðul í familjuni

Ein góður máti at stuðla tvørkyndum í familjuni er at vera ein góð fyrimynd og vísa øðrum vegin. Tá ið familjan setur seg inn í málið og vísir áhuga, er tað eitt greitt tekin fyri tey tvørkyndu, at tey kunnu rokna við at vera møtt við stuðli og kærleika. Stuðul heiman minkar um vandan fyri, at tvørkynd fáa sálarliga løstir, hava sjálvmorðshugsanir, fremja sjálvskaðandi atburð og sjálvmorðsroyndir.

## Hvussu stuðli eg? – 4 ráð

Ein góður stuðul dugir væl at lurta og geva rúmd. Í flestu førum eru tað tey tvørkyndu, sum vita mest um at vera tvørkynd, og sum kenna síni egnu ynski og egnan tørv best. Tvørkynd kunnu tó kenna trýst, um tað støðugt er upp til tey at greiða frá – og ofta verja – hvørji tey eru. Tí er gagnligt at umrøða evnið við positivum forvitni, umsorgan og virðing.

## Vitan og kunning

Ein góður stuðul kann vera við til at breiða út vitan og kunning um kynssamleika, kyn og normar. Vantandi vitan er orsøk til flestu misskiljingar og fordómar.

## Brúka røtt nøvn

Brúka altíð rætt navn og fornavn (hann/hon). Tað kann vera neyðugt og rætt at rættleiða onnur á siðiligan hátt, um tey brúka skeivt navn ella fornavn.

## Tryggja inklusión

Góður stuðul tryggjar, at tvørkynd verða inkluderað í einum tryggum umhvørvi við at tala ímóti neiligum viðmerkingum ella óhóskandi spurningum.

## Finn ein spegil

Lat tann tvørkynda hava onkran at spegla sær í. Tvørkynd hava kanska tørv á at síggja partar av sínum samleika endurspeglast í øðrum fólkum ella persónum, soleiðis at tey ikki kenna seg einsamøll við sínum upplivingum. Ein góður stuðul kann hjálpa til við at finna fyrimyndir og felagsskapir.

# Skúlaviðurkenning avgerandi

Tað er umráðandi, at tvørkynd verða sædd og viðurkend sum tað kynið, tey sjálv uppliva seg at vera. Bæði familja og skúli hava ein týðandi leiklut í at skapa eitt trygt og virðismikið umhvørvi, har tann tvørkyndi næmingurin kann vera tann hann er og luttaka í virksemi og felagsskapum saman við øðrum.

Foreldur ella nærmastu familjulimir kunnu vera við til at tryggja, at námsfrøðingar og lærarar eru tilvitaðir um støðuna hjá tí tvørkynda og hava grundleggjandi vitan um, hvussu teir best stuðla einum tvørkyndum.

Tey vaksnu rundan um ein tvørkyndan næming mugu stuðla og hjálpa hvørjum øðrum at finna skilagóðar loysnir, sum eru grundaðar á sálarligu heilsuna hjá næminginum. Foreldur, námsfrøðingar og lærarar í skúlanum vilja sjálvandi tað besta fyri næmingin, men ivamál og ósemjur um, hvat er rætt at gera, kunnu koma í. Gott samskifti millum skúla og heim er tí lykilin til at tryggja vælveruna hjá einum tvørkyndum næmingi.

# Fimm samstarvsráð

## Byrja við ynskjum og tørvi hjá næminginum

Skúlin skal altíð hava næmingin og foreldrini við í avgerðunum um, hvussu skúlavirksemi og fyriskipanir skulu lagast eftir tørvinum hjá næminginum. T.d. við at skipa fyri fundi við næmingin og foreldrini, har ein ætlan verður gjørd um, hvussu kunnast skal, og hvør skal vera við í tilgongdini.

Ein viðurkennandi tilgongd savnar seg um rættin hjá tí einstaka næminginum at vera tann, hann er, og skapar rúmd fyri hugsanum og royndum hjá næminginum. Tvørkyndir næmingar hava persónlig ynski og tørv, sum lærarar og námsfrøðingar mugu vera varugir við. Tað er eingin rættur háttur at vera tvørkynd/ur, og umstøðurnar hjá einum kunnu víkja nógv frá umstøðunum hjá einum øðrum.

## Lat næmingin seta ferðina

Tað er týdningarmikið, at næmingurin møtir viðurkenning og góðkenning frá foreldrum, lærarum og námsfrøðingum, uttan mun til nær ella hvussu næmingurin velur at deila sín kynssamleika og byrjar sína tilgongd at liva í samsvari við sín kynssamleika. Tað er eingin røtt ella skeiv løta at siga øðrum frá sínum kynssamleika. Tað má koma innanífrá og frá næminginum sjálvum. Lærarar, námsfrøðingar og foreldur eiga at stuðla næminginum í at finna sína egnu ferð í menningini móti at liva í sínum rætta kyni.

## Lat næmingin navnkenna seg fyri flokkinum

Ein tvørkyndur næmingur kann velja at siga flokkinum frá, tá ið hann kennir seg til reiðar at gera tað. Fyri ein tvørkyndan næming kann tað vera eitt stórt stig at skula siga floksfeløgunum frá nýggja samleikanum. Tí er týdningarmikið, at lærararnir hjá næminginum stuðla og bjóða sær til at hjálpa honum at svara spurningum frá hinum næmingunum.

Nógvir tvørkyndir næmingar hava havt eina jaliga uppliving, tá ið teir sjálvir ella lærarin lesa eitt bræv fyri flokkinum, har næmingurin hevur sett orð á sínar royndir og ynski um, hvat navn og fornavn (hann/hon) hinir næmingarnir skulu brúka.

## Deil bara upplýsingar, tá ið tað er neyðugt

Lærarar og námsfrøðingar skulu altíð lurta eftir og virða ynskini hjá næminginum um, hvør skal vita um fyrra navnið og kynið. Tað kann vera sera óhugnalig uppliving fyri ein tvørkyndan næming, um upplýsingar um kynsstøðuna hjá honum verða deildar uttan samtykki hansara.

Umstøður og viðurskifti, so sum í skiftirúmi og brúsu eftir ítrótt ella handfaring av næmingaupplýsingum, kunnu vera praktiskar grundir fyri, at viðkomandi lærarar, vikarar, heilsustarvsfólk ella onnur starvsfólk kenna støðuna hjá næminginum.

## Tryggja tær, at næmingurin hevur ein vaksnan í trúnaði

Summi tvørkynd kunnu ikki tosa við foreldrini um sín kynssamleika, tí tey ikki skilja ella góðtaka, at barnið er tvørkynt. Í eini støðu, har næmingurin ikki hevur stuðul frá familjuni, er tað serliga týdningarmikið at hava ein vaksnan í trúnaði. Her hava lærarar, námsfrøðingar og onnur starvsfólk í skúlanum ein týdningarmiklan leiklut at skapa eitt trygt umhvørvi, har ein tvørkyndur næmingur kann vera tann, hann er, og fáa stuðul og viðurkenning.

Um lærarar og námsfrøðingar eru væl skikkaðir til tað – og næmingurin kennir seg til reiðar – kann skúlin hjálpa til við at skipa fyri samrøðuni millum næming og foreldur í tryggum umhvørvi, har foreldrini eru kunnað um týdningin av viðurkenning og stuðli.

# Tú ert ókey, sum tú ert - 4 ráð

## Minst til, at næmingurin er tann sami persónurin

Tá ið ein tvørkyndur næmingur velur at stíga fram, er tað vanliga tað fyrsta stigið í eini longri tilgongd móti at liva sum tað kynið, ið næmingurin vil. Tað kann koma óvart á, at ein næmingur er tvørkyndur og vil verða viðurkendur við einum øðrum kyni. Tó hevur næmingurin hvørki broytt persón ella samband við lærarar og vinir. Tí er gott at minnast til, at næmingurin, sum tú hevur kent alla tíðina, bert hevur valt at siga frá sínum kynssamleika og vónar at halda fram við at vera góðtikin og elskaður.

## Virð navn og málsliga kyn næmingsins

Tá ið ein næmingur vil verða nevndur við nýggjum navni og broyta málsligt kyn, er týdningarmikið, at umhvørvið fylgir við. Hóast tað kann taka eitt sindur av tíð at venja seg við, eigur tú altíð at brúka valda navnið og rætta kynsfornavnið hjá næminginum – sjálvt um næmingurin ikki er hjástaddur. Tað er eitt gott hugskot bæði at rætta teg sjálva/n og gera vart við, um onnur brúka skeivt navn ella kyn um ein næming.

## Gev næminginum fyrimyndir

Tað er rættiliga vanligt, at ung noyðast at síggja seg sjálvi í øðrum fyri at menna sín egna samleika og sína egnu sjálvsfatan. Fyri tvørkynd, sum í gerandislívinum sjáldan uppliva fólk, ið eru sum tey, kann tað vera umráðandi at hava onkran at síggja upp til, so tey ikki kenna seg skeiv ella gerast einsamøll við sínum tonkum og royndum.

Seinastu árini hava bókmentir og miðlar skapt meira rúm hjá tvørkyndum at tosa opið um lívið. Lærarar kunnu vísa næmingum, at pláss er fyri ymsum samleikum og royndum í heiminum við at taka positivar frásagnir við í undirvísingina.

## Leita eftir og deil vitan

Fordómar og manglandi vitan um, hvat tað vil siga at vera tvørkyndur, kunnu vera orsøk til, at tey møta mótstøðu í gerandislívinum. Tí er týdningarmikið, at lærarar og námsfrøðingar hjálpa til at upplýsa og geva øðrum atgongd til vitan um tvørkynd.

Verið greið yvir, at ein tvørkyndur næmingur ikki neyðturviliga vil vera tann, sum svarar spurningum frá øðrum um, hvat tað vil siga at vera tvørkynd/ur. Tí kann tað vera eitt gott hugskot hjá lærarum og námsfrøðingum at leita eftir vitan frá viðkomandi felagsskapum og serkønum.

# Ein tryggur gerandisdagur fyri øll – 3 ráð

Vantandi stuðul og viðurkenning kunnu hava fylgjur fyri læru og vælveru hjá einum tvørkyndum næmingi og kunnu fáa álvarsamar avleiðingar seinni í lívinum. Tí er umráðandi at skapa eitt trygt umhvørvi, har tvørkyndir næmingar á jøvnum føti við onnur kunnu vera partur av felagsskapinum og harvið hava bestu umstøður fyri góðari og tryggari skúlagongd.

## Berjist móti fordómum og happing

Tvørkyndir næmingar eru ábærir fyri bæði vanligari og talgildari happing, diskriminerandi málburði og manglandi viðurkenning millum lærarar og næmingar.

Ein tvørkyndur næmingur, sum óttast at verða útihýstur úr samfelagnum ella verða avdúkaður í skúlanum, er í stórum vanda fyri at fáa angist ella tunglyndi. Slík happing kemur serliga fyri í samfeløgum við lítlum tollyndi fyri fjølbroytni. Tað eru ofta næmingarnir, sum falla uttan fyri normin, ið verða valdir út sum teir veiku. Tí er týdningarmikið, at lærarar og námsfrøðingar taka tað í álvara, um ein næmingur upplivir at verða valdur út orsakað av kynssamleika.

## Undirvís í kyni, fjølbroytni og rættindum

Negativar viðmerkingar, óhóskandi spurningar og fordómar kunnu standast av vantandi vitan og fatan Við opnum og góðum samrøðum um kyn, fjølbroytni og rættindi í undirvísingini kunnu lærarar og námsfrøðingar fyribyrgja happing og skapa eitt tryggari skúlaumhvørvi fyri allar næmingar.

## Minst til, at hinir næmingarnir kunnu vera ein góður stuðul

Tað er týdningarmikið fyri hvønn einstakan næming at verða góðtikin sum partur av felagsskapinum og hava góðar vinir kring seg. Ein tvørkyndur næmingur kann óttast, hvussu hinir næmingarnir fara at vera. Vanliga eru floksfelagar tó góðir sameindir, og flestu fólk skilja og góðtaka skjótt, at vinur teirra er tvørkyndur.

# Samband og meira kunning

www.foreldurattvorkyndum.fo



FØROYAPRENT | SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705